gult6 cyan6 magenta6 svart6

Friðarlig forðing í Lorvík

Arbeiðarafeløgini í Lorvík, Gøtu og Fuglafirði eru aftur farin at forða farmaflutningi á Lorvíkskai

VERKFALL
Eyðun Klakstein

Mánanáttina fóru arbeiðarafeløgini kring landið aftur undir forðingar á støðum, har vanliga nógvar farmaflutningur er.

Á Lorvíkskai fóru arbeiðsfólk úr Lorvík, Gøtu og Fuglafirði aftur undir at sína forðing.

Í gjáramorgunin varð ein vørubilur, sum kom úr Klaksvík steðgaður, áðrenn hann slapp í land, og hann mátti tí fara aftur til Klaksvíkar.

Verkfalsfólkini steðga bara vørubilum, meðan persónbilar sleppa ígjøgnum forðingina uttan at verða kannnaðir, soleiðis sum annars varð gjørt, áðrenn løgreglan legði uppí í farnu viku.

Einki rusk

Umfamt farmaflutningin verður flutningurin av ruski eisini raktur av forðingini í Lorvík.

IRF í Norðoyggjum fær ikki flutt ruskið á brennistøðina í Lorvík, og tí er innsavningin av ruskinum í Norðoyggjum steðgað.

Allar bingjur hjá IRF í Norðoyggjum eru á tremur, og tí sleppa hvørki húsarhald ella virki av við ruskið hjá sær í hesum døgum.

IRF hevur latið fólkið fleiri rusksekkir, so tey kunnu goyma burturkastið við hús, til verkfallið er av.

Friðarligt

Tá vit tosaðu við Lorvíkar Arbeiðsfelag fyrrapartin ígjár, høvdu tey einki sæð til løgregluna.

Forðingin í Lorvík hevur ikki havt við sær stóru ósingina.

Tað hevur fyri tað mesta gingið friðarliga fyri seg, og verkfalsfólkini halda, at tey, sum fara um Lorvíkskai, eru fyrikomandi og duga at handafara serligu støðuna.

Verkfallsfólkini siga eisini, at tey royna sum frægast at halda støðuna friðarliga og ikki órógva fólk óneyðuga nógv.

Føroyski rockbólkurin Týr fer mikukvøldið at luttaka í donsku finaluni av stórari í europeiskari tónleikakapping
Mynd: Jens Kristian Vang

Týr í danskari tónleikafinalu

Føroyski rockbólkurin, Týr, skal í annaðkvøld kappast í donsku finaluni av europeisku tónleikakappingini, Emergenza. Vinnarin sleppur til europeisku finaluna í Týsklandi

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Mikukvøldið fer føroyski bólkurin, Týr, at kappast ímóti 11 donskum bólkum í stórari europeiskari tónleikakapping.

Kappingin kallast Emergenza, og er ein risastór kapping fyri nýggjar bólkar, sum ætla sær fram. Vinnarin av donsku kappingini sleppur at luttaka í europeiska endabrestinum, sum verður í Týsklandi.

Í apríl mánaði var Týr við í einum av fýra innleiðandi kappingum í Danmark. Her gekk tað so væl, at Týr vann sína innleiðandi kapping.

Tríggir bólkar komu víðari frá hvørjum innleiðandi umfari, og tað gevur tí 12 finalistar í kappingini, sum verður hildin í Store Vega í Keypmannahavn í annað kvøld.

Vinnarin sleppur við á Taubetal Open Air Festival, har vinnarar frá kappingunum kring um í Europa eisini verða við.

Gera bart í Jelling

Týr er ein rímuliga nýggjur bólkur, sum hevur fingið sítt fólksliga gjøgnumbrot við eini rockútgávu av Orminum Langa.

Bólkurin var við í Prix Føroyar tónleikakappingini, og í finaluni gjørdust teir annar av bólkunum, sum vóru valdir at spæla á donskum festivali.

Týr skal spæla í Jelling seinast í hesum mánaðinum, og teir ætla sær at gera nógv burtur. Teir verða á pallinum í ein tíma, og teir ætla so at siga bara at spæla sín egna tónleik.

Umframt danska festivalhugan, hevur plátufelagsstjórin, Jens Ove Friis, eisini víst Týr áhuga, og ætlanin er at gera onkrar upptøkur í hesum sambandi.

Týr er eisini við í aðrir danskari tónleikakapping. Tað er Melody Maker Contest, sum er ein kapping, sum bara fer fram í danska høvuðsstaðnum. Týr hevur longu vunnið tvey innleiðandi umfar, og skal tí verða við í finaluni, sum verður hildin fyrst í komandi ári.

Fiskavirking í truplari støðu

Føroya Fiskavirking fær ikki framleitt vørur til sínar kundar uttanlands, og tað kann fáa avleiðingar fyri fyritøkuna

VERKFALL
Eyðun Klakstein

Øll seks virkini hjá Føroya Fiskavirking liggja still í hesum døgum.

Hóast alt starvsfólkið ikki er í verkfalli, ber ikki til at hava framleiðsluna koyrandi, tí meginparturin av arbeiðsfólkinum er farin heim.

– Vit eru sum so nógv onnur rakt av verkfallinum. Hóast øll fólkini hjá okkum ikki eru í verkfalli, kunnu vit ikki hava framleiðsluna koyrandi, tí so nógv fólk er burtur, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

Flestu av hinum virkjunum í landinum eru eisini rakt av verkfallinum hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

– Verkfallið skapar eina óhepna støðu hjá okkum, men enn vita vit ikki, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri okkum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking

Kunnu missa útflutning

At framleiðslan hjá Føroya Fiskavirking liggur still merkir sjálvandi, at kundarnir hjá Føroya Fiskavirking í útlondum ikki fáa ta vøruna, sum teir hava roknað við úr Føroyum.

– Okkara kundar høvdu ynskt, at vit ikki vóru raktir av verkfallinum, men har er einki at gera. Hetta er eingin ynskistøða, men enn vita vit ikki, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri okkum, sigur Meinhard Jacobsen.

– Tað kann sjálvandi henda, av vit missa kundar av hesum verkfallinum, men vit ælta ikki at taka sorgina uppá forhond, sigur hann.

Drúgt verkfall verri

Kundar hjá Fiskavirking finna sær í hesum døgum aðrar framleiðarar, sum kunnu lata teimum fisk, og tað kann í sær sjálvum fáa ávirkan á útflutningin hjá Fiskavirking.

– Vit ganga ímóti heitari tíðum, og tá verður minni etið av fiski. Tí mugu vit vóna, at verkfallið ikki fær nakrar álvarsligar avleiðingar fyri okkum, sigur Meinhard Jacobsen.

– Tað ger sjálvandi støðuna hjá okkum verri, um verkfallið varðar í langa tíð. Kemur verkfallið at standa við í langa tíð afturat, er meiri sannlíkt við avleiðingum fyri okkum, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking.

Halda fram hóast skúlin er skitin

Skúlagongdin á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy heldur sum vanligt, hóast onkrir næmingar eru givnir at ganga í skúla

SKÚLI
Eyðun Klakstein

Seinastu tvær vikurnar hevur ikki verið vaskað á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali, men hóast hetta heldur skúlagongdin fram sum vanligt.

Skrivligu prótvtøkurnar hjá 3.g vórðu lidnar í gjár, og restina av vikuni er vanlig skúlagongd á skránni. Munnligu prótvtøkurnar byrja í næstum, og HF-flokkarnir fara undir sínar próvtøkur fríggjadagin.

– Vit hava als ikki ráð at gevast við skúlagongdini nú, tí so fer alt út av lagi, sigur Sámal í Skorini, stjóri.

– Um vit bara missa ein av próvtøkudøgunum, so kemur sperðil í, tí próvtøkuætlanin er so tøtt, sigur hann.

Onkur farin heim

Tað sæst aftur á skúlanum, at eingin hevur vaskað har farnu 14 dagarnar, og tað hevur eisini havt onkrar avleiðingar.

– Onkrir næmingar, sum hava astma ella allergi, eru farnir heim, tí teir fáa ikki verið í skúlanum, men hjá flestu næmingunum bilar tað ikki, sigur Sámal í Skorini.

– Skúlin er langt frá so reinur, sum hann plagar at verða, men vit hava ongar ætlanir um at steingja skúlan. Støðan verður kaotisk, um vit ikki halda fram við skúlagongdini og próvtøkunum.

200 næmingar ganga á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy, meðan eini 175 næmingar eru á Handilsskúlanum á Kambsdali, har tey eisini halda fram við skúlagongdini hóast verkfallið.

gult7 cyan7 magenta7 svart7

S&K í samhuga fyri knappa millión



600 skrivstovu- og krambafólk hava higartil rindað knappar 1.300 krónur í part í stuðuli til verkafeløgini í verkfalli. Hetta er ein upphæd á tilsamans umleið 800 túsund krónur

800 túsund krónur beinleiðis úr lummanum. Hetta er tað, teir 600 limirir í S&K higartil hava offrað fyri at sýna samhuga við fakfeløgunum í verkfalli

SAMHUGI
John Johannessen

600 limir í felagnum fyri skrivstovu- krambafólk hava higartil rindað tvær daglønir úr egnum lumma, fyri at stuðla Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag í sáttmálatrætuni.

S&K fór náttina til fríggjadagin í 24 tíma samhugaverkfall við einum so at siga tómum verkfallsgrunni, ið varð stovnaður fyri knøppum tveimum árum síðani. Og náttina til mánadagin tóku limirnir í S&K upp aftur verkfallið.

Eingin dagpeningur

Avgjørt er, at limirnir ikki fáa pening úr soltna verkfallsgrunninum, um tey í verkfallsdøgunum ikki eru beinleiðis úti og stuðla verkafeløgunum í verkfalli við blokadum og øðrum. Og sambært forkvinnuni í S&K hava limirnir enn ikki verið úti á barrikadunum.

Sotatt hava tey sekshundrað skrivstovu- og krambafólkini higartil rindað knappar 1.300 krónur í part í suðuli til verkafólkini. Hetta er tilsamans ein upphædd, ið nærkast 800 túsund krónum, ið beinleiðis kunnu roknast sum gáva til Ingeborg Vinther og Vígdis Johannesen saman við limum teirra.

Halda møguliga á

Leila Zachariassen, sum er forkvinna í S&K, vil ikki siga, hvussu leingi felagið ætlar at vera í samhugaverkfalli við verkafeløgunum.

– Vit vóru fyrst í einum 24 tíma samhugaverkfalli. Men verkfallið, vit nú hava lýst, er ikki avmarkað til 24 tímar. Vit ætla okkum at lýsa, nær vit fara til arbeiðis aftur. Men eg fari ikki at siga nú, nær tað verður, sigur Leila Zachariassen.

Tingmaður á barrikadunum

Hans Pauli Støm, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, var ein av verkfallsvaktunum í Kollafirði náttina til mánadagin. Hann hevur sjálvur boðið sær at vera við á einum av vaktarliðunum

VERKFALL
John Johannessen

Javnaðarflokkurin er flokkurin hjá verkafólkunum.

Hetta roynir ein av tingmonnum floksins at prógva við at vera beinleiðis við í stríðnum hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag fyri at vinna limunum hægri løn.

Tá verkfallsforðingarnar í Kollafirði klokkan tvey náttina til mánadagin vórðu upp aftur tiknar eftir ein steðg um vikuskiftið var Hans Pauli Strøm, tingmaður, ein av verkfallsvaktunum.

– Eg standi her, tí eg ringdi til Ingeborg og segði, at eg vildi hjálpa til. Tá hon so ringdi til mín og bað meg koma at standa verkfallsvakt við hesum vaktarliðinum, tók eg av beinan vegin, segði Hans Pauli Strøm við Sosialin í oysandi regninum í Kollafirði mánanáttina

Týsdagin røkti Hans Pauli Strøm aftur starv sítt, sum tingmaður. Tá var hann á fundi í grundlógarnevndini.

Hans Pauli Strøm, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, er farin beinleiðis upp í trætuna á arbeiðsmarknaðinum. Mánanáttina var hann verkfallsvakt í oysandi regni í Kollafirði
Mynd: Jens Kristian Vang

Løgmaður fylgir gongdini

Løgmaður hevur enn ongar ætlanir um at leggja upp í trætuna á arbeiðsmarknaðinum. Men hann fylgir gongdini neyvt

Enn hevur løgmaður ongar ætlanir um at fáa tingið saman at steðga verkfallinum. Men hann hann fylgir kortini neyvt gongdini

VERKFALL
John Johannessen

– Vit hava enn ongar ætlanir um at leggja okkum út í trætuna á arbeiðsmarknaðinum.

Hetta eru framvegis boðini frá Anfinni Kallsberg, løgmanni, tá vit spyrja hann, um hann ætlar at heita á tingformannin um at kalla tingið saman úr sunmarfríi, til at loysa trætuna á arbeiðsmarknaðinum við løgtingslóg.

Men løgmaður fylgir kortini neyvt gongdini og er allatíðina á varðhaldi.

– Tað eru vit, ið hava ábyrgdina av landsins viðrum. ILA sjúkan er ein stórur trupulleiki, og nú sleppa alarar heldur ikki at seta út smoltið, ið skal vera ársins vinningur. So tað er klárt, at vit fylgja gongdini. Men eingin er glaður fyri at leggja seg í eitt stríð á arbeiðsmarknaðinum, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg útilokar kortini ikki, at politiskt myndugleikin fer at leggja seg uppí. Tað kemur allt ann uppá, hvat hendir, sigur hann.

Ein annar háttur, at fáa tingið saman at steðga verkfallinum er, um 17 tingfólk skriva undir eina áheitan á tingformannin um at kalla tingið saman.

Heimasíða um verkfallið

Føroya Arbeiðarafelag hevur í sambandi við verkfallið stápað eina tíðindatænastu á internetinum upp á beinini

VERKFALL
John Johannessen

Fyri at fjølmiðlar og fólk annars allatíðina kunnu fáa feskastu tíðindini um verkfallið, hevur Føroya Arbeiðarafelag gjørt eina tíðindatænastu á internetinum.

Felagið hevur sett ein fyrrverandi blaðmann at fylgja við gongdini í verkfallinum og dagføra tíðindi á heimasíðu felagsins við feskasu upplýsingunum frá verkfallinum.

Heimasíðan hjá Føroya Arbeiðarafelag er at finna á www.fafelag.fo